# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-097_9.3
dags. 14-07-2011

**Innlendimálaráðið**
**Att.: Hilmar Høgenni**

Teldupostur: sami

***Viðv.: Kommunala umskipanin, sum løgd fram á fundi í IMR 4. juli***

Sagt verður frá, at stýri felagsins hevur á fundi 12. juli, viðgjørt omanfyri nevnda mál, sum lagt var fram á fundi 4. juli, í Innlendismálaráðnum. Á hesum fundinum vóru Helena Dam á Neystabø lsm., Rósa Samulesen lsm., umboð fyri Kommunusamskipan Føroya og umboð fyri Føroya Kommunufelag.

Vísandi til stutta hoyringsfreist uppá 14 dagar, og rúgvusmikið hoyringstilfar, hevur stýrið viðmerkt 3 av teimum 9 lógaruppskotunum sum viðvíkja málinum, uppskot til broyting í løgtingslóg um sjálvbodna kommunusamanlegging (nr.1), uppskot til samtyktar um at leggja eldrarøktina til kommunurnar at umsita (nr. 2), uppskot um fígging av eldrarøktini (nr. 9).

Viðgerðin hjá stýri Føroya Kommunufelags endurspeglar meiningarnar hjá kommununum, sum hava verið at hoyra í fjølmiðlunum dagarnar aftaná fundin. Stýrið kemur ikki til semju í málinum um samanlegging av kommununum, sum samtyktirnar her á eftir vísa.

<u>Uppskot til broyting í løgtingslóg um sjálvbodna kommunusamanlegging</u>

Samtykt 1:
Grundleggjandi eiga kommunusamanleggingar at vera framdar sjálvbodnar, og eftir fólksins vilja. Føroya Løgting eigur at skipa fyri einari vegleiðandi fólkaatkvøðu í øllum kommununum, samstundis sum komandi løgtingsval verður, har spurningurin um kommunusamanleggingar verður avgjørdur. Kommunurnar eiga at hava møguleikan at velja at vera sjálvstøðugar. Føroyar Løgting og kommunurnar eiga at virða fólksins vilja.
Fyri: Johan Christiansen, Hans Jákup Kallsberg, Erik Davidsen, Delmar Tausen.

Samtykt 2:
Fyri uppskotinum um samanlegging: Karl Olsen, Albert Ellefsen, Dánjal Jákup Jakobsen, Asbjørn Djurhuus.
Móti uppskotinum um samanlegging: Jógvan K. Mørkøre. Vil ikki at felagið vegna kommunurnar biður Løgtingið at leggja saman. Kommunala sjálvstýrið má ikki undirminerast.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Uppskot til samtyktar um at leggja eldrarøktina til kommunurnar at umsita

Semja um, at uppskotið um at leggja eldrarøktina til kommunurnar, er **treytað av samráðing** millum land og kommunur um allar tættir innan flytingina.

Uppskot um fígging av eldrarøktini

Semja um, at **útjávning skal við** í fíggingarleistin fyri eldrarøktina, tá økið verður lagt út til kommunurnar. Kommunurnar hava ólíkar inntøkumøguleikar og tí eru fleiri kommunurnar skuldarbundnar og illa fyri fíggjarliga.

fyri felagið

Sveiney  Sverrisdóttir, skr.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo